


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 05 - 2013

# Statoil ger týðandi oljufund í Norðsjónum

Statoil hevur gjørt eitt nýtt oljufund í Norðsjónum, har góðskan á oljuni er sera góð, skriva norskir miðlar í morgun. Sum skilst hevur hetta nýggja fundið stóran týdning fyri aðrar oljukeldur í økinum. Tað fer at leingja livitíðina hjá teimum. Hóast tað skjótt eru hálvthundrað ár síðani, at fyrstu oljukeldurnar vórðu funnar í Norðsjónum, so verða tað framhaldandi gjørd nýggj fund á longu kendum oljuleiðum. Hetta er við til at halda lív í framleiðsluni í mong mong ár aftrat. Henda seinasta keldan er mett at goyma upp til 33 milliónir tunnur av olju. Talan er um eina keldu í Grana økinum og sum kann mennast í sambandi við framleiðsluna á Grana framleiðslupallinum. Tore Løseth, sum er varaforseti hjá Statoil fyri Norðsjógvin sigur, at felagið er sera væl nøgt við úrslitið av boringini, nú góðskan er so góð. Tað er ein týðandi partur av strategiini hjá Statoil at finna olju og gass nærhendis verandi framleiðandi feltum í Norðsjónum, og higartil hevur henda strategi riggað væl. Hóast hetta seinasta fundið er munandi minni enn tey fund, sum Statoil hevur gjørt seinastu árini, eitt nú Johan Sverdrup, so hevur tað alstóran týdning fyri livitíðina hjá grannafundum verður sagt í skrivi frá Statoil í morgun.